# Gravgangur eftir íløgum

**Seinastu níggju mánaðirnar hava viðskiftafólk hjá Føroya Banka gjørt íløgur fyri til samans hálva milliard krónur**

ÍLØGUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Verulig gongd er komin á hugin hjá føroysku spararunum at gera íløgur í annað enn bara bankabøkur.

Seinasta árið hava teir báðir stóru peningastovnarnir av álvara eisini teknað seg í meldurin av útboðum til íleggjarar, og áhugin fyri vørunum hevur verið serstakliga stórur, skilst.

Føroya Banki hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at kundar bankans seinastu níggju mánaðirnar hava gjørt íløgur fyri hálva milliard krónur, og tað er eitt greitt tekin um meira virknar íleggjarar, verður sagt.

– Vit uppliva eina stóra broyting á íløguøkinum. Fólk vilja meira enn bara at hava peningin standandi í bankanum. Tað er merkisvert, at ein fittur partur av teimum 500 milliónunum, sum íløgur eru gjørdar fyri seinastu níggju mánaðirnar, er eftirlønir,"sigur Janus Petersen, forstjóri í bankanum.

Hann fegnast um, at tann vakstrarstrategi, sum Føroya Banki setti sær fyri at fremja í verki í summar á íløguøkinum, hevur eydnast.

– Vit settu okkum sum mál í juni 2005, at íløgurnar í bankanum skuldu vaksa við einari milliard í trý ár. Níggju mánaðir seinni eru vit longu komin hálva leið at røkka málinum, og tað vísir, at teir 20 íløguráðgevararnir, vit júst hava útbúgvið, gera eitt gott arbeiði, og at íløguhugurin millum fólk er sera stórur, ljóðar staðfestingin í tíðindabrævinum.

# Sparikassin upp á 3,80

**Eftir at Føroya Banki í farnu viku hækkaði sína rentu, hevur Føroya Sparikassi nú gjørt tað sama**

RENTA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta verður gjørt, nú Tjóðbankin í tveimum umførum hevur hækkað sína rentu við til samans 0,5 prosentstigum.

Við virkni frá mikudegnum hevur Sparikassin soleiðis hækkað lægstu bústaðarrentuna úr 3,45 upp í 3,80 stig. Sum meginregla hækka aðrar útlánsrentur samsvarandi, meðan innlánsrentan verður óbroytt. Hetta tí innlánsrentan ikki broyttist, tá útlánsrenturnar lækkaðu seinasta heyst.

Í tíðindaskrivi sigur Sparikassin annars, at ábendingarnir greitt tala fyri fleiri rentuhækkingum í næstum, og vilja teir tí mæla fólki til at umhugsa møguleikan fyri fastlæstu rentuni, sum er á realkredittlánunum.

Samstundis hevur Sparikassin boðað frá, at tann 1. apríl verða broytingar gjørdar í ómaksgjøldunum fyri manuelt avgreiddar tænastur, sum nú verða nakað dýrari.

# Føroyskar bio-lýsingar

**Havnar Bio og ReproZ hava gjørt avtalu um framleiðslu og sýning av føroyskum biograflýsingum**

LÝSINGAR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá hølini í Havnar Bio tann 26. mai læta upp eftir eina ætlaða umvæling, verður fyri fyrstu ferð møguleiki at síggja føroyskar biograflýsingar.

Hvíta løriftið hevur í nógv ár verið brúkt í londunum kring okkum sum lýsingarmiðil, og sum heild hava lýsarar tikið væl ímóti hesum miðili.



# Brekkubrothers gevur fløgu út í summar

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við, at Brekkubrothers í ár fer á konsertferð til Føroyar, Svøríki, Norra og Danmark gevur bólkurin fløgu út í summar. Talan er um tær upptøkurnar sum bólkurin í fjør gav út á alnetinum, og sum liggja inni á www.brekkubrothers.com.

Í tíðindaskrivi sigur bólkurin, at fólk hava spurt hví alnet tónleikurin hjá bólkinum ikki kom út á fløgu, og nú bólkurin fyrireikar konsertferð, hava teir valt at taka fjeppararnar upp á orðið.

Á konsertferðini skal Brekkubrothers spæla saman við einum solisti úr hvørjum landi teir vitja.

Í Norra spælur Ole Jørn Myklebust trompet, hann er fastur limur í Mari Boine Band og Geir Lysne Listening Ensemble.

Í Føroyum spælur Ólavur Olsen trompet, og var hann eisini við til innspælingarnar hjá Brekkubrothers.

Í Danmark skal Søren Bebe spæla klaver, hann spældi við á fløguni "Sooner Or Later", hjá Hans Petur.

Peter Asplund verður solistur í Svøríki, hann telist millum mest umbidnu trompetistarnar í Svøríki og spælur millum annað við Bo Kasper, Lisu Ekdahl, Stockholm Jazz Orchestra og Svante Thuresson.

Í Brekkubrothers spæla Hans Petur í Brekkunum (saksofon), Trygvi R í Brekkunum (trummir), Bjarki Meitil (bass) og Magnus Johannesen (tangentar).

# 48 Pages vísir alt

**Tónleikur, prát, myndir og filmar hjá og um bólkin 48 Pages er lagt á heimasíðuna hjá bólkinum, 48 Pages skjalprógva, at bólkurin hevur verið til**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*48 Pages hava lagt eitt ótal av myndum á heimasíðu sína*

Garrvilli rokkbólkurin 48 Pages var ein av virknastu og mest spennandi ungu rokkbólkunum í Føroyum fyri nøkrum árum síðan. Men sum í so nógvum bólkum eru onkrir av tónleikarunum farnir av landinum í lestrarørindum. Hóast bólkurin ikki alment er givin, so er hann heldur óvirkin á konsertpallinum í løtuni. Men tey, ið sakna tónleikin hjá 48 Pages, kunnu nú aftur smíla. Tí bólkurin hevur lagt alt tilfarið hjá sær út á heimasíðuna. Her eru fleiri enn 20 mp3'arar at taka niður, bæði samrøður við bólkin og tónleikur tikin upp í upptøkuhøli og á konsertum. Tveir filmar eru eisini á síðuni ein um upptøkurnar av fløguni Ampaljóð og eitt sjónbandalag.

48 Pages hevur altíð verið ein sera visuellur bólkur, og hetta sæst á tí stóru rúgvuni av myndum, ið eru lagdar á síðuna. Her eru myndir av konsertum, úr venjingarhølinum, úr upptøkuhølunum og nógv annað.

Samanumtikið skjalfestir heimasíðan, hendan øgiliga spennandi bólk, ið tíanverri ikki er virkin í løtuni. Hetta er enn ein av bólkunum, ið eru komnir úr tí sera livandi og spennandi tónleikalívinum á Margarinfabrikkini. Um tær dámar harðan rokk www.48pages.net eitt must, fyri øll onnur gevur heimasíðan innlit í eina tónlistarliga ekstrema verð, ið bæði er áhugavert og undirhaldandi.